NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

MERKISDAGAR

Diamantbrúdleyp
Leygardagin 12. des. hava hjúnini Herbjørg og Eiler Egholm, Gripsvegur 29, Tórshavn, diamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin heima saman við systkjum og døtrum við familju.

Silvurbrúdleyp
Mánadagin 7. des. hava Anna og Kári Egholm Jacobsen, Glyvrar, verið gift í 25 ár. Veitsla verður 19. des. í Bygdarhúsinum í Leirvík fyri innbodnum.

Silvurbrúdleyp
Týsdagin 15. des. hava vit Kára og Abraham Løkin, Runavík, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík frá kl. 18. Tey ynskja at gleða okkum við at koma, kunnu siga frá á tlf. 221980 (abraham) ella 272777 (Kára) áðrenn fríggjadagin 11. des.

Silvurbrúdleyp
Týsdagin 29. des. halda við bæði, Pálin og Henry Olsen, Rituvík okkara silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin við veitslu í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tit, ið ynskja at gleða okkum við at koma, kunnu siga frá á tlf. 219134 (Henry) ella 223534 (Pálin). Til ber eisini at senda ein teldupost: henry-o@olivant.fo ella palin.olsen@skulin.fo áðrenn 15. desember.

Prógv
Mikudagin 9. desember 2009 tók Eyðun Skarðhamar, búsitandi í Herborg, (sonur Heðin og Thyru Skarðhamar) sveinaroynd sum bilplátusmiður við Tekniska Skúla í Silkeborg. Eyðun hevur lært hjá Reyni Service í Hoyvík og hjá Uggerhøj Biler í Herning.

Diamantbrúdleyp

Leygardagin 12. desember 2009 hava hjúnini Herbjørg og Eiler Egholm, Gripsvegur 29, Tórshavn, diamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin heima saman við systkjum og døtrum við familju.

Dagurin
10. desember. Judit. Apokrýfiska bókin í Gamla testamenti greiðir frá konubrotinum Judit, sum høgdi høvdið av herhøvdinganum Holofernes. Navnið er bíbilskt og merkir jødakvinna.
(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)

Leivur Nattestad vann bilin

Sjúrður Johansen frá Ivan Bilum, Marjun Nattestad, Andrias Lamhauge, formaður í NSÍ, og Leivur Nattestad
Mynd: Jens Kristian Vang

Í dag var bilurin, sum ítróttarfelagið NSÍ hevur burturlutað, latin hepna vinnaranum Leivur Nattestad úr Miðvági hjá Ivan Bilum við Hoyvíksvegin.

Seinastu tveir mánaðirnar hava fólk frá NSÍ verið kring um í landinum og selt lutaseðlar. Seðilin varð trekturá marknaðardegnum, ið var í høllini í Runavík tann 28. november. Umframt bilin varð eisini trekt um aðrar vinningar sum t.d. familjuferð við Norrønu og flogferð til Danmarkar fyri tvey.

Hepni vinnarin av bilinum, ein Mitsubishi Colt, var Leivur Nattestad í Miðvági. Hann keypti tveir lutaseðlar, og tað var seðil nummar 0055, sum vann.

-red

Travel People um Johan

Í sambandi við at Johan Restorff fylti 70 år sunnudagin 6. desember var ein grein í danska ferðavinnublaðnum Travel People, har blaðstjórin Preben Jack Petersen m.a. skrivar: ”Sammen med sin yngre broder, MC kaldet, drev fødselaren i så at sige en menneskealder færøernes dengang mondæne Hotel Hafnia i hjertet af Thorshavn.

Hotellet var stedet, man som tilrejsende forretningsmand boede på, når der skulle besøges kunder på Færøerne, og ligeledes udgjorde det scenen, når Østre Landsret blev sat i den færøske hovedstad.

Som professionelle hotelfolk var både Johan Restorff og lillebroderen altid synlige på hotellet, og de var i alle år gode turistambassadører for den nordatlantiske øgruppe. Hver eneste morgen, når lufthavnsbussen forlod hotellet, stod mindst den ene af de to Restorff’er foran hotellet og vinkede farvel til gæsterne. Det var en ceremoni, mange Hafniagæster aldrig glemmer”.

Kelda: travelpeople.dk